Sjálvgjørt er vælgjørt - Ella hálvgjørt

Í farnu viku skriva›u vit, at ta› bla›i› gjørdist ta› seinasta undir hesu lei›slu á Yngd. Hetta vísti seg tó ikki at vera heilt satt. Men nú kunnu vit vi› vissu sta›festa›, at hetta bla›i› gerst ta› allar seinasta undir hesu lei›slu.

Nakrar av gó›u gomlu kreftunum á Yngd hava gjørt bart, og eru nú komnar aftur í húsi›. Hetta er bara at frøast um. Sjálvandi. Hervi› fari› eg at ynskja gamla/n‡ggja bla›fólkinum á Yngd, um vit kunnu siga ta› á henda hátt, væl afturkomnum og gó›an byr› í starvinum.

At ta› hevur alstóran t‡dning at skriva tilfar til ungdómin, man líti› vera at ivast í. Ungdómurin er framtí›in ver›ur sagt, og rætt er ta›. Tí hevur ta› stóran t‡dning at skriva mergja tilfar til ungdómin.

Mi›larnir hava stóra ávirkan á ungdómin. Tí eigur ta› at vera uppgávan hjá mi›lunum at gera so gott og seriøst tilfar, sum til ber.

Vit á Yngd settu okkum fyri fyrr í ár, at fara undir at skriva um útbúgvingar og útbúgvingarmøguleikar hjá ungum í Føroyum. Men, sum nú fráfarandi bla›stjóri› á Yngd, má eg bert ásanna›, at vit ikki gjørdu okkara arbei›i hesum vi›víkjandi til lítar. Og tíverri kunnu vit siga. Onki hev›i frøtt okkum meira enn at geva ungdóminum innlit í, hvørjar útbúgvingarmøguleikar tey hava.

Men av ymsum orsøkum komu vit ongantí› so langt sum at skriva slíkar greinar. Tíverri.

Men her eigur Útvarp Føroya rós uppibori›. Í Ungdómssendingini Geykn ver›ur nógv gjørt burtur úr at grei›a frá útbúgvingarmøguleikum hjá ungum í Føroyum. Hetta er eitt stórt arbei›i› og eiga teir bá›ir vertirnir í sendingini stórt rós uppibori› fyri ta› megnar arbei›i teir gera.

Fyri at fara til naka› heilt anna›, so hava vit sum vant nógv anna› at bjó›a kræsna lesaranum í dag. Vit hava í dag eina grein vit kalla› “HB og B36 - Hell´s Angels og Bandidos”. Her ver›ur hugt eitt líti› sindur nærri at, hvat ta› er, sum ger HB og B36 til ringastu arvafíggindar. Nor›l‡si› skírdi, í hvussu so er fyri nøkrum árum sí›ani, HB og B36 fyri Hell´s Angels og Bandidos.

Eisini hava vit gjørt eitt sindur burturúr føroyska tónleikabólkinum Kjølar.

Føstu tættirnir eru sum vant vi› okkum í dag. Hitlistarnir eru á tremur vi› gó›um fløgum og í teiginum “Svara So” hava vit hesafer› fingi› unga stjørnuskoti› í B36, Jákup á Borg, at svara 20 spurningum Yngd hevur sett til hansara.

Fløguummælari okkara, The one and only, Dagfinn Olsen, hevur aftur hesa vikuna veri› og leita› sær tríggjar spildur n‡ggjar fløgur fram at ummæla. Hvat hann hevur fingi› burturúr hesum n‡ggju fløgum, síggja tit sum vant á baksí›uni.

Ta›, sum vit tó eru mest fegin um, er, at vit hesafer› hava fingi› brøv sendandi til okkara kæru brævbumbu. Hetta eru vit fegin um, og takka vit mangar fer›ir fyri brøvini.

At enda fari eg bert at takka fyri meg á hesum sinni, og ynski eg hervi› Yngd og bla›fólki tess alt ta› besta og gó›an byr› framyvir.

Send inn og vinn

3arin

letur eina fløgu um vikuna til teg, sum hevur besta innslagi› í Yngd.

Vinn eina fløgu

Nú gevur Yngd tær eisini møguleikan at vinna onkra av nýggjastu fløgunum, sum eru á marknaðinum. Fyri at lesararnir eisini skulu hava høvi at koma fram at, hava vit sjálvsagt rúm fyri einum brævkassa, har lesararnir fáa høvi til at siga sína hugsan um líkt og ólíkt.

Hevur tú eina yrking, eitt hjartasuff um okkurt, ella ein spurning til Yngd ella okkurt heilt annað, so er bara at finna pennin ella telduna fram, og skriva til okkum. Antin til Sosialurin postboks 76, 110 Tórshavn, merk brævbjálvan „Yngd“. Ella send okkum teldupost á yngd@sosialurin.fo

Hvørja viku verður so drigið lut ímillum innkomnu brøvini, og vinnarin fær eina spildurnýggja fløgu sendandi frá 3‘aranum í SMS. Fyri at eingin skal smæðast burtur, seta vit onga treyt um at innkomið tilfar verður undirskrivað við fullum navni. Navn og bústaður eiga tó verða upplýst til Yngd, soleiðis at vit vita, hvar ein møgulig fløga skal sendast.

Tí›indabla›i› Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn
Tlf: 311820
Fax: 314720
Teldupostur:
yngd@sosialurin.fo

Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller

Bla›stjórn:
Jákup Bogi Joensen

Uppseting:
Karis Olsen

Yngd er ein partur av Sosialinum mikudag. Evstamark er á middegi fríggjadag

Les Yngd í Sosialinum hvønn mikudag

HB og B36
- Hell's Angels og Bandidos

Stóru fótbóltsfeløgini í Havn, HB og B36, hava altí› veri› arvafíggindar. Ø›rvísi kemur ta› nokk ongantí› at ver›a, men at feløgini ver›a skírd Hell´s Angels og Bandidos, tekur neyvan nakar HB´ari ella B36´ari undir vi›

Jákup Bogi Joensen

Tað er ikki at taka munnin ov fullan, tá sagt verður, at fótbólturin er tjóðarítrótt Føroya.

Og tað skert ikki burtur, at tá talan er um føroyskan fótbólt, so eru Havnarfeløgini bæði, HB og B36, ofta ovast á breddanum.

Og tað er kanska ikki so løgið. Bæði hava tey nógv til felags. Bæði eru tvey vælvirkandi feløg, hava góð úrslit at vísa á seinastu árini, og bæði liggja í høvuðsstaðnum. Í Tórshavn. Hetta ger so aftur tað, at HB og B36 hava nógv flestar limir, og eru uttan iva millum størstu ítróttarfeløg í landinum.

Men hvat er tað, sum sermerkir HB og B36?

Dystirnir eru altíð nakað heilt serligt millum hesi bæði feløg, og verða skírdir mangt og hvat. Slagið um Havnina. Og tað er heldur ikki at gera ov nógv av, tá sagt verður, at júst hesir dystir millum HB og B36 eru millum mest tíðandi fyri bæði feløgini í øllum kappingarárinum.

Leikararnir geva alt hvat teir eiga og kanska meira aftrat, og áskoðararnir orka ikki gronina í hvørjum øðrum - undir dystinum væl at merkja.

Jú, tað er so púra vist, at bæði leikarar og áskoðarar taka dystirnar í størsta álvara.

Men tað slepst ikki undan, at trupulleikar hava stungið seg upp millum HB og B36 gjøgnum árini, og hesum hava bløðini gjørt sær dælt av. Hvør minnist ikki, tá Norðlýsið visti at siga, at grannaklandrið í Gundadali millum HB og B36 var nú so álvarsamt, at tað kundi samanberast við rockarastríðið millum Hell´s Angels og Bandidos. Nei, hevur man vitað so galið.

Væl vita vit, at HB og B36 eru arvafíggindar so tað baskar, men at fara so langt sum at siga, at tað kann samanberast við rockarastríðið í Danmark, tað er at fara ov langt.

Sjálvur hevur undirritaði gingið nógv í Gundadali tey seinastu árini og má siga, at tað eru ikki so fáar skemtisøgur, ein kann skava sær saman har uppi. Vit fara her at endurgeva tvær teirra. Og hóast tær ikki eru nýggjar, so kunnu tær væl brúkast hóast alt.

Hvat hava B36 og Nuuk til felags?

Bæði hava 12 stig í juli mánað.

Hvat hava HB og kvinnuhúsið til felags?

Tey bukað ongan.

Jú, nógvar eru søgurnar.

Sat annars við einum V4 seðli í hondini herfyri. Og tá okkara kæri útvarpsstjórið var liðugur við at lesa tølini upp, kundi eg staðfesta, at eg hevði onki vunnið. Men eg kom kortini til tað niðurstøðu, at onkur B36´ari mátti havt vunnið hetta kvøldið. Tølini eg sjálvur hefti meg við í hesum sambandi vóru 19-36-62-97. Jamen, hetta eru jú perfektu tølini til ein rættan B36´ara.

Hvussu tølini hjá HB skuldu verið sett inn í ein V4 seðil, tað má so vera upp til tann einstaka at taka støðu til.

HB og B36 hava altíð verið arvafíggindar. Torført er at ímynda sær, at tað kemur at vera stórt øðrvísi. Men hví skal tað tað.

Men at verða skírd Hell´s Angels og Bandidos, tekur neyvan nakar HB ´ari ella B36´ari undir við.